# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*Samrøða er við Geir Wardum frá Nordjysk Lift, Charlis Johansen, Sigmund Hansen, ellisakfør, og Hans Joensen, bileigara í Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.05*




# Lyftibilur til nógvar ymiskar uppgávur

**LYFT**

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Leigufyritøkan Nordjysk Lift A/S í Stiðjagøtu hevur ein Iveco lyftubil, sum er sera væl egnaður til nógvar ymiskar uppgávur. Geir Wardum frá Nordjysk Lift sigur, at nógvir fyrimunir eru við hesum bilinum.

Hann vigar undir 3.500 kg, so tað krevst einans vanligt koyrikort fyri at koyra bilin.

Tann sum leigar bilin kann ordna alt sjálvur. Frá kurvini í lyftini kann hann t.d. starta motorin á bilinum og stýra lyftini har sum hann hevur brúk fyri tí.

Bilurin kann brúkast ístaðin fyri stillads, so har er nógv tíð at spara. Sum t.d. tá ið húsini skulu málast og stiðin ikki røkkur, ber til at brúka lyftibilin til tær torføru uppgávurnar.

Bilurin hevur hópin av innbygdum trygdarskipanum og lýkur øll ES-krøv um trygd. Lyftin røkkur upp á 18 metra hædd. Fyritøkan kann annars útvega lyftur heilt upp til yvir 50 metrar.

Samrøða er við Geir Wardum frá Nordjysk Lift á Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.05.





*Lyftibilurin hevur hópin av innbygdum trygdarskipanum og lýkur øll ES-krøv um trygd*

*Lyftin røkkur upp á 18 metra hædd. Maðurin í lyftikurvini er Klæmint Mittún frá Magn*